umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

<table>
<tr><td colspan="2">Navn á virki við góðkenning:<br>P/F Bakkafrost Freshwater<br>Smoltstøð í Skálavík</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá virki:<br>Bakkavegur 9, 625 Glyvrar</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi fyri virksemi:<br>At klekja rogn og framleiða sjóbúnan laksafisk (smolt)</td></tr>
<tr><td>Aliloyvi.:</td><td>Staður:</td></tr>
<tr><td>S-26 Skálavík</td><td>Matrikkul nr. 20b og 15c Skálavík</td></tr>
<tr><td>Mál nr.:</td><td>Galdandi frá:</td></tr>
<tr><td>24/06397-2<br>23/02064-2</td><td>27. mars 2026</td></tr>
</table>

Umhvørvisstovan, hin 27. mars 2026

Sigga Jacobsen, deildarleiðari / Roar Heini Olsen, umhvørvisviðgeri

## 1. Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av smoltstøð[1] hjá P/F Bakkafrost Freshwater á matr. nr. 20b í Skálavík er givin við heimild í §§ 26, stk. 1, 29 og 31 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 (hereftir nevnd umhvørvisverndarlógin) og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Aling av fiski er í bólki J í fylgiskjali til lógina. Virksemi í hesum bólki er fevnt av kapitli 5 í umhvørvisverndarlógini og skal tí hava umhvørvisgóðkenning.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Sambært § 26 í umhvørvisverndarlógini mugu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir nevnd í fylgiskjalinum til lógina ikki verða gjørd ella farin undir, fyrr enn góðkenning er givin til slíkt.

Um fyritøka, virki ella útbúnaður ikki verða broytt sambært § 26, kann Umhvørvisstovan, tey fyrstu fimm árini eftir at góðkenningin er givin, bert geva boð ella forboð sambært § 34, 4. stk., um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast, tá góðkenningin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar- ella skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan sambært § 34, 5. stk. broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Kunngerðir, sum annars eru galdandi fyri hetta virksemi, og sum Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, eru:

- kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn,
- kunngerð nr. 147 frá 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, og
- kunngerð nr. 40 frá 9. apríl 1992 um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kapittul 7 í umhvørvisverndarlógini.

[1] Kunngerð nr. 80 frá 14. juni 2019 nýtir heitið sjóbúningarstøð fyri støðir til at leggja inn, klekja og gróðurseta livandi verur, áðrenn tær verða settar á sjógv, íroknað laksafisk.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

## 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 28. november 2023 umsókn frá P/F Bakkafrost Freshwater um umhvørvisgóðkenning av smoltstøð í Skálavík. Við umsóknini var tekning av støðini, lýsing av ætlaðu framleiðsluni á smoltstøðini, kortyvirlit av ætlaðum vatnbyrgingum, Góðkent kortskjal – Skálavíkar kommuna, ljóðsimulering og dømi um innaneftirlit hjá P/F Bakkafrost. Hetta er í samsvari við § 30 í umhvørvisverndarlógini um, at saman við umsókn um góðkenning sambært §§ 26-28 skulu verða hjálagdar neyðugar ætlanir, tekningar og frágreiðingar, ið gera ætlanina skilliga, umframt ein tilskilan av slag og nøgd av ætlaðari ella verandi dálking. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar við tí endamáli at minka um hesa dálking.

Eftirfylgjandi hevur Umhvørvisstovan móttikið fylgjandi:

14. juni 2024, dagførd umsókn.

11. oktober 2024, dagførd ljóðeftirgerð.

12. oktober 2024, upplýsingar frá Skálavíkar kommunu um broytt støða av teigi í bústaðarøki til atkomuveg.

11. november 2024, fráboðan frá Skálavíkar kommunu um ætlaðar broytingar í byggisamtykt viðvíkjandi vegi og ásetingar fyri øki C.

21. mars 2025, ætlaða staðseting av ravmagnsgerara og oljutangum, tal og stødd á oljutangum, upplýsingar um reinsing av inntøkuvatni við UV og Ozon.

3. juni 2025, skitsa við tveimum alternativum staðsetingum av høvuðsfrárensli út á sjógv.

3. oktober 2025, viðmerkingar frá P/F Bakkafrost til uppskot um umhvørvisgóðkenning.

6. november 2025, tekniskar upplýsingar um oljutangar og oljurør.

11. november 2025, tekniskar upplýsingar um ávaringarskipanir í sambandi við oljutangar og oljurør.

7. januar 2026, tvørskurð av boriholi og korttilfar, sum vísir staðseting av frárensli frá støðini.

5. februar 2026, fráboðan um, at P/F Bakkafrost ikki hevur nakað at leggja afturat uppskotinum til umhvørvisgóðkenning.

23. mars 2026, knattstøður og dýpd av spillvatnsfrárensli frá støðini umframt skitsumynd av boringini og uppsetan á havbotninum.

## 3. Viðgerð

Sum grundarlag til at áseta treytir til spillvatn, spillluft, óljóð og annað hevur Umhvørvisstovan í viðgerðini av umsóknini, umframt umhvørvisverndarlógina og kunngerðirnar, ið eru nevndar

niðanfyri, nýtt føroyskar og aðrar norðurlendskar, í høvuðsheitum danskar og norskar, vegleiðingar og góðkenningar, íroknað:

- Umsókn um umhvørvisgóðkenning við tilhoyrandi fylgiskjølum
- Norðurlendsk BAT-frágreiðing um aling: *BAT for fiskeopdræt i norden*[2]
- Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: *Ekstern støj fra virksomheder, vejledning nr.5/1984*
- Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: *Lavfrekvent støj, infralyd og vibrationer i eksternt miljø: nr.9/1997*
- *Kunngerð nr. 94 frá 15. juni 1994 um eldfiman løg*
- *Kunngerð nr. 124 frá 11.09.2018 um at fyribyrgja dálking frá oljutangum*
- *Vegleiðing um at seta upp oljutangar, Arbeiðs- og brunaeftirlitið, 11.09.2018*
- *Bekendtgørelse nr. 1257 af 27. nov. 2019 om indretning, etablering og drift af olietanke, rørsystemer og pipelines (olietankbekendtgørelsen)*

### 3.1 Málsviðgerð

Vísandi til § 1, 1. stk. í umhvørvisverndarlógini er dentur lagdur á at fyribyrgja og minka um dálking av luft, vatni og jørð, at fyribyrgja og minka um ampar av larmi, at fyribyrgja dálking við burturkasti og at fremja endurnýtslu.

Harafturat er dentur lagdur á at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið eru av týdningi fyri heilsu- og frílótu- (rekreativ) kor hjá menniskjum og fyri at varðveita fjøltáttað plantu- og djóralív sambært 2. stk. í somu grein.

Í viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- At minka um dálking og ampar av spillvatni, óljóði o.ø., og at goymslur við olju og øðrum dálkandi evnum eru tryggar,
- at skarn og fóðurleivdir ikki skulu elva til upphópan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella aðrar broytingar í umhvørvinum,
- at P/F Bakkafrost Freshwater hevur vælvirkandi innaneftirlit, umhvørvisstýrisskipan og skrásetingar,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta umhvørvisskaðilig ella dálkandi evni, ið verða brúkt í sambandi við virksemið, út við meira umhvørvisvinarlig evni,
- at umhvørvisdálkandi evni í minst møguligan mun verða leidd út í umhvørvið,
- at virkið skal avmarka dálking mest møguligt við at nýta bestu tøku tøknina (BAT[3]), og
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær ella at fiskur sleppur, skal minkast mest møguligt.

### 3.2 Hoyring

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð hin 19. desember 2025 sent P/F Bakkafrost, Skálavíkar kommunu og Heilsufrøðiligu starvsstovuni til hoyringar. Freist at gera viðmerkingar til hoyringina var 5. februar 2026.

P/F Bakkafrost sendi nýtt tilfar um frárenslið frá støðini og hevði annars ongar viðmerkingar.

Skálavíkar kommuna hevði ongar viðmerkingar.

## 4. Lýsing av virkseminum

Vísandi til tilfarið í umsóknini verður gjørd ein lýsing av smoltstøðini og virkseminum.
Ætlaða støðin er staðsett fram við sjóvarmálanum í norðaru útryðjuni av Skálavíkar bygd, á matrikli nr. 20b, Skálavíkar kommuna. Fyri virksemi á sama matrikli hevði Umhvørvisstovan 22. desember 2022 veitt P/F Bakkafrost Freshwater umhvørvisgóðkenning av einari lívfiskastøð, sum í nógvar mátar hevði fevnt um líknandi vídd og virksemi, tó bert við okkurt um einum tíggjundaparti av fóðurnýtslu og framleiðsluni, sum nú er ætlan um.

Sambært galdandi byggisamtykt er økið lagt út til C-øki til vinnu- og ídnaðarendamál. Økið sunnan- og lutvíst vestan fyri er lutvíst B-øki lagt út til bústaðir, eitt minni H-øki til frílendi, og annars til landbúnað. Vatnbrunnarnir til smoltstøðina verða á matrikkli 15c, beint norðan fyri matrikul 20b.

Heilsufrøðiliga starvsstovan upplýsir, at støðin fær aliloyvi nr. S-26.

## 5. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Í fylgiskjali 1 eru umhvørvisviðurskiftini lýst til tess at fáa greiðu á, hvørjar treytir skulu setast til virksemið. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftunum er mesti dentur lagdur á at minka um dálking og ampar frá útláti av spillvatni, larmi frá virkseminum, og at minka um árin frá dálking við olju og kemikaliu vegna óhapp. Metingin av umhvørvisviðurskiftum er grundað á, at virkið sambært P/F Bakkafrost Freshwater árliga fer at framleiða um 8 mió. smolt við eina miðalvekt á um 0,5 kg, tilsamans um 4.000 tons árliga, og at nýta upp til 4.000 tons av fóðri.

Allar viðkomandi treytir eru settar upp undir nr. *6. Góðkenningartreytir.*

## 6. Góðkenningartreytir

Sambært § 31, 2. stk. í umhvørvisverndarlógini skulu ásettar treytir viðvíkjandi stovnsetan og rakstri virkisins verða nevndar í góðkenningini.
Smoltstøðin í Skálavík kann leggja inn laksarogn, klekja laksayngul og framleiða smolt og sjóbúnan laksafisk. Mest loyvda fóðurnýtslan er 4.000 tons um árið. Umhvørvisgóðkenningin fevnir um alt virksemi, sum er knýtt at støðini í Skálavík. Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

### 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning við møguligum broytingum og dagføringum skal altíð vera tøk á virkinum, og øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið og treytirnar í henni.

6.1.2 Um virkið verður broytt byggifrøðiliga ella rakstrarliga, soleiðis at útlát frá virkinum broytist, skal P/F Bakkafrost Freshwater senda Umhvørvisstovuni skrivliga fráboðan um hetta frammanundan. Umhvørvisstovan viðger og tekur avgerð um, hvørt neyðugt er við nýggjari góðkenning.

6.1.3 P/F Bakkafrost Freshwater skal tryggja, at veitarar eru kunnaðir um treytir í hesi góðkenning, sum eru viðkomandi fyri teirra veiting.

6.1.4 Sýnistøkur og kanningar v.m. sambært hesaumhvørvisgóðkenning skulu gerast av óheftum stovni ella felagi, sum hevur førleika at gera arbeiðini.

6.1.5 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum sambært hesi umhvørvisgóðkenning, verða goldnar av P/F Bakkafrost Freshwater.

6.1.6 Um virkið skiftir eigara, broytir navn ella verður tikið av, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta.

6.1.7 Um virksemið steðgar fyribils, skal útgerð og tilfar uttandura antin tryggjast soleiðis, at tað ikki er til ampa fyri umhvørvið, ella beinast burtur. Harafturat skal eigari ella brúkari tryggja, at olja, evnafrøðilig (kemisk) evni ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunnu dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

6.1.8 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan, at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

### 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Hendan støðin og tilhoyrandi útgerð hjá P/F Bakkafrost Freshwater í Skálavík skal verða staðsett og rikin soleiðis, sum sagt er frá í umsóknini og øðrum tilfari, sum er sent Umhvørvisstovuni.

6.2.2 Mest loyvda útlát sambært hesi góðkenning svarar til eina fóðurnýtslu uppá í mesta lagi 4.000 tons um árið.

6.2.3 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum og olju, skal gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.2.4 Evnafrøðilig (kemisk) evni skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslur.

6.2.5 Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum, sum hóska til endamálið, t.d. í UN-góðkendum íløtum, sum eru merkt soleiðis, at tað sæst, hvat innihaldið er.

6.2.6 Møguligir lekar ella óhapp við olju, evnafrøðiligum (kemiskum) evnum, laka av deyðum fiski og øðrum flótandi burturkasti og líknandi, skulu kunna haldast aftur á avmarkaðum økjum og skulu kunna takast upp.

6.2.7 Hølir, ið verða nýtt til goymslu av olju, evnafrøðiligum (kemiskum) evnum, deyðum fiski, øðrum flótandi burturkasti og líknandi, skulu hava tætt undirlag og skulu innrættast soleiðis, at møguligt spill verður hildið aftur og ikki kann seta til frárensl, ið leiða út um virkið. Undirlagið ella uppsamling skal í minsta lagi kunna halda nøgdini í tí størsta ílatinum aftur.

6.2.8 Innandura goymslur av evnafrøðiligum (kemiskum) evnum skulu hava luftskifti, sum hóskar til evnini í goymsluni.

6.2.9 Uttandura goymslur av evnafrøðiligum evnum skulu vera vardar ímóti vindi og regni og vera skipaðar soleiðis, at óviðkomandi ikki sleppa at teimum.

6.2.10 Ymisk evnafrøðilig (kemisk) evni, eitt nú sýra, fosfor og evni, ið innihalda klor, sum, um tey blandast, kunnu skaða umhvørvið ella gerast vandamikil, skulu goymast hvørt sær, í góðkendum íløtum, við hóskandi frástøðu og soleiðis, at óviðkomandi ikki sleppa at teimum.

6.2.11 Oljutangar, íroknað arbeiðstangar, rørskipanir og onnur útgerð knýtt at hesum skal vera sniðgóðkend av avvarandi myndugleika. Uppsetan ella niðurgraving og íbinding skal gerast sambært vegleiðing frá framleiðara, galdandi lóggávu[4] og vegleiðing hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um at seta upp oljutangar[5].

6.2.12 Um arbeiðið verður gjørt á annan hátt enn sambært krøvunum í nr. 6.2.11, skal P/F Bakkafrost Freshwater senda Umhvørvisstovuni prógv fyri, at tað lýkur galdandi krøv og er góðkent av avvarandi myndugleika.

6.2.13 Oljutangar skulu vera so atkomiligir, at tað ber til at kanna teir, umframt at lesa (pejla) innihaldið av.

6.2.14 Jarðhol ætlað til niðurgrivnar oljutangar skulu gerast soleiðis, at tey ikki kunnu fyllast av vatni, so at tangarnir kunnu flotna.

6.2.15 Nærhendis áfyllingarstaðnum skal vera pláss, har tangabilur fær staðið.

6.2.16 Allir tangar, nýggir sum gamlir, skulu hava útlufting og eina virkna ovurfyllingarávaring uttandura, í mesta lagi 10 metrar frá áfyllingarstaðnum, og sum í sambandi við áfylling fer í gongd, áðrenn tangin flýtur yvir.

---

[4] Kunngerð nr. 94 frá 15.06.1994 um eldfiman løg, §§ 4 & 5, §§ 10-12, § 15, § 16, litra d, og §§ 25-27

[5] Vegleiðing um at seta upp oljutangar, Arbeiðs- og brunaeftirlitið, 11. september 2018

6.2.17 Niðurgrivin oljurør skulu leggjast í verjurør, ið tola tey trýst, ið kunnu koma fyri á staðnum, t.d. í sambandi við ferðslu, ella sum minstamark, verða umgyrd til allar síður av 15 cm av hóskandi verjandi tilfari, ið er lagt soleiðis, at tað ikki kann skola burtur.

6.2.18 P/F Bakkafrost Freshwater skal senda Umhvørvisstovuni korttilfar og tekningar av skipanini.

6.2.19 Eftir at arbeiðið er gjørt, skal P/F Bakkafrost Freshwater lata inn neyðug skjøl sambært galdandi lóggávu og vegleiðing, íroknað lýsing av oljutangaskipanini og rørskipanini, umframt prógv fyri tættleika og tekning, ið vísir, hvar á ognini oljutangin ella tangarnir verða staðsettir.

6.2.20 Oljutangar og Tangar og tangaskipan skulu hava følarar (sensorar), sum eru knýttir at yvirvákingar- og alarmskipan, sum er í framhaldandi nýtslu, og sum ger tað møguligt at fylgja við nøgdini av olju í tangunum. Skipanin skal vera atknýtt alarmi, sum boðar frá, um oljunøgdin í oljutangaskipanini minkar, tá talan ikki er um nýtslu- ella royndarkoyring av neyðstreymsgeneratorum. P/F Bakkafrost Freshwater skal við hóskandi millumbilum eftirkanna, at alarmskipanin virkar eftir ætlan.

6.2.21 Um P/F Bakkafrost Freshwater fær ábending um, at oljutangi ella oljurørleiðing lekur, skal felagið beinanvegin taka neyðug stig fyri at finna og steðga lekanum og forða fyri, at støðan endurtekur seg. Møgulig umvæling skal gerast av felagi, sum hevur førleika til at gera arbeiðið.

6.2.22 Nýtsla, goymsla, áfylling, umskipan og tapping av eldfimum løgi skal fara fram undir tryggum skipaðum umstøðum og við neyðugum varsemi.

6.2.23 Um bilar koma við olju, skulu teir standa inni á økinum hjá P/F Bakkafrost Freshwater á oljutøttum undirlagi við frárensli til reinsiskipan, meðan olja verður fylt á tangarnar.

6.2.24 Fyri hvønn einstakan tanga, sum olja skal fyllast á, skal innihaldið vera mált, áðrenn áfylling byrjar, og gerast skal greitt, hvussu nógv olja skal fyllast á.

6.2.25 Hóskandi útgerð at avmarka og basa dálking skal vera á staðnum.

6.2.26 Oljutangi, sum verður tikin endaliga úr nýtslu, skal avriggast. Tangi, rørleiðingar og áfyllingartútur skulu tømast og takst burtur. Tó kunnu avvarandi myndugleikar eftir umsókn veita undantak, um tað verður mett umhvørvisliga ráðiligt og rímiligt, treytað av at tangin verður fyltur við sandi og áfyllingarstaðið tipt. Tangi, sum fyribils verður tikin úr nýtslu, skal tippast og oljuveitarin kunnast.

### 6.3 Útlát á sjógv

6.3.1 P/F Bakkafrost Freshwater skal brúka bestu tøku tøknina (BAT) fyri at minka um fóðurspill, so útlátið verður so lítið sum gjørligt.

6.3.2 Alt frárensluvatn frá støðini skal verða savnað í eitt frárenslurør. P/F Bakkafrost Freshwater skal, áðrenn støðin verður tikin í nýtslu, senda Umhvørvisstovuni frágreiðing við korttilfari um, hvar og hvussu útleiðingin verður løgd.

6.3.3 P/F Bakkafrost Freshwater skal, áðrenn leiðingin verður tikin í nýtslu, lata gera undankanning av botninum og djóralívinum á botninum, har sum munnin á spillvatnsleiðingini fer at vera. Leisturin skal vera sambært galdandi vegleiðing hjá Umhvørvisstovuni um umhvørviseftirlit við alivirksemi á sjónum, við hóskandi atliti at botnviðurskiftunum, streymviðurskiftum og umstøðunum á staðnum. Kanningarstøð skulu leggjast og kanningar gerast av óheftum felagi. Kanningarætlan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.3.4 Um kanningin sambært 6.3.3 bendir á bleytan botn kring munnan á spillvatnsleiðingini, skal P/F Bakkafrost Freshwater umleið 3 ár eftir, at útleiðingin er tikin í nýtslu, seint á sumri, gera í minsta lagi eina kanning av botninum og djóralívinum á botni á somu støðum sum í undankanningini. Kanningarætlan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.3.5 Eftir at hava móttikið frágreiðing um kanning sambært 6.3.4. tekur Umhvørvisstovan støðu til, um neyðugt er við fleiri kanningum, tiltøkum ella bøtandi atgerðum. Frágreiðingin skal samanbera kanningina í pkt. 6.3.3 og 6.3.4.

6.3.6 Farast kann ikki undir at nýta støðina, fyrr enn spillvatnsleiðingin er løgd út, og spillvatnið frá støðini kann leiðast ígjøgnum hana.

6.3.7 Eftir at framleiðslan er fullvirkin, skal P/F Bakkafrost Freshwater í minsta lagi í trý ár taka í minsta lagi 6 nøgdarproportional samdøgurssýni av spillvatninum frá framleiðsluni um árið. Sýni skulu takast úr spillvatnsleiðingini, eftir at spillvatn frá øllum framleiðslueindum og reinsiskipanum er savnað saman, og meðan virksemið er størst møguligt.

6.3.8 Spillvatnið skal sambært viðkomandi donskum ella samsvarandi standardi kannast fyri suspenderað evni (DS 207), fiti og olju (DS/R 208), evnafrøðiligan (kemiskan) súrevnistørv COD (M016) og mineralska olju (DS/R 208). Sýnini skulu takast javnt býtt yvir árið. Kanningarætlan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.3.9 Spillvatnsútleiðigin skal leggjast soleiðis, at hon ikki elvir til upphópan av evnum ella tilfari í sjóvarmálanum ella á botni, ella til slóðir ella aðrar broytingar í umhvørvinum. Vísir tað seg, eftir at spillvatnsleiðingin er løgd og støðin er tikin í nýtslu, at kravið ikki kann haldast, skulu bøtandi atgerðir fremjast.

6.3.10 Nýtslan av evnum, sum, tá tey verða útleidd við spillvatninum, kunnu hava neiliga ávirkan á umhvørvið, eitt nú evni til at tálma soppi og bakterium og til at reingera og sóttreinsa, skal avmarkast mest møguligt, og miðast skal altíð eftir at brúka evni, sum eru minst skaðilig fyri umhvørvið.

6.3.11 P/F Bakkafrost Freshwater skal tryggja, at plast frá smoltstøðini, íroknað biokroppar (biomedia) í biofiltrum, ikki verður skolað út við spillvatni.

### 6.4 Útlát til luft

6.4.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttan fyri økið hjá støðini.

6.4.2 Brennievnið til neyðstreymsgerara (generator) og ketlar kann í mesta lagi innihalda 0,1 % v/v av svávuli í miðal um árið, treytað av, at aðrar ásetingar í lóggávu ikki seta strangari krøv.

6.4.3 Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

6.4.4 Allar útleiðingar til luft, sum kunnu hava dálking við sær, skulu leiðast uppeftir og í minsta lagi ein metur upp um tak[6].

### 6.5 Óljóð, ristingar og ljós

6.5.1 P/F Bakkafrost Freshwater hevur ábyrgd av, at bilar og bátar, sum hava beinleiðis tilknýti til virksemið á støðini, arbeiða ljóðskynsamt, so at minst møguligt óljóð stendst av virkseminum.

6.5.2 Ískoytið til óljóðstyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá P/F Bakkafrost Freshwater og beinleiðis avleiddum virksemi, skal ikki fara upp um mørkini í talvu 1.

**Talva 1.** Mørk fyri óljóðstyngd* ymsar dagar, klokkutíðir og tal á tímum í ymsum økjum

| Dagur | Klokkutíð | Tímar ** | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) | Øki 5 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 | 40 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 | 40 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 | 35 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 | 35 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 | 35 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 | 35 |

*Óljóðstyngdin: Óljóðsstøðið mátað sum orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark[7]

**Tímar: Miðal óljóðsstyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði má ikki fara upp um markvirðið, t.d. má miðalvirði fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) fyri Øki 4.

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram

Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram

Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki

Øki 4: Bústaðarøki við raðhúsum í fleiri hæddum og/ella við opna og lága bústaðarbygging

Øki 5: Summarhúsøki, alment atkomulig fríløtu (rekreativ) øki og serlig náttúruøki

[6] Ikki neyðugt, um talan t.d. bert er um køling/hitaveksling uttan útlát av royki ella lukt.

[7] Næsta grannamark skal skiljast sum grannamark til matriklar og/ella økir, sum koma undir Øki 1-5

6.5.3 Í øki 3 og 4 skal ískoytið til óljóðstyngdina frá virkseminum í tíðarskeiðinum 22-07 ongantíð fara meira enn 15 dB(A) upp um markvirðini nevnd í talvu 1 í treyt 6.5.2.

6.5.4 Markvirði fyri lágfrekvent óljóð og infraljóð sum harðasta 10 minuttirs tíðarbil, mátað innandura**, eru í talvu 2.**

**Talva 2.** Markvirði fyri lágfrekvent óljóð og infraljóð innandura sum harðasta 10 min. tíðarbil

| Øki | Klokkutíð | 10-160 Hz dB(A) | <20Hz dB(G)* |
|---|---|---|---|
| Í bústøðum, á stovnum og líknandi | 18.00 – 07.00 | 20 | 85 |
| | 07.00 - 18.00 | 25 | 85 |
| Á skrivstovum, í frálæruhølum og øðrum líknandi ljóðviðkvæmum rúmum | - | 30 | 85 |
| Í ikki-ljóðviðkvomum rúmum á øðrum virkjum | - | 35 | 90 |

*) dB(G): G-vigað infraljóðstøði

6.5.5. Ravmagnsgerarar (generatorar) til at framleiða el, tá streymslit er, skulu royndarkoyrast yrkadagar millum kl. 07 og 18.

6.5.6 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur ampar av ristingum við sær.

6.5.7 Nýtsla av ljósum skal vera soleiðis, at tað ikki hevur ampar við sær.

6.5.8 Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk fyri at røkka einum støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

6.5.9 Í seinasta lagi tá støðin verður tikin í nýtslu og koyrir við fulla inniløgu, skulu ljóðkanningar gerast av óheftum felagi.

6.5.10 Verða markvirðini sambært talvu 1 (nr. 6.5.2) og talvu 2 (nr. 6.5.4) ikki hildin, skal P/F Bakkafrost Freshwater senda Umhvørvisstovuni ætlan um, hvussu galdandi mørk kunnu lúkast við tíðarætlan fyri skjótast gjørligt at seta neyðug tiltøk í verk.

6.5.11 Verða ampar av óljóði fráboðaðir, kann Umhvørvisstovan krevja nýggjar mátingar av óljóði gjørdar av óheftum felagi, og, um óljóðsstøðið er oman fyri galdandi mørk, at munadygg tiltøk verða sett í verk fyri at minka um óljóðið.

6.5.12 Felagið skal skráseta fráboðaðar ampar av óljóði og skal saman við avvarandi starvsfólki og øðrum viðkomandi viðgera og seta átøk í verk fyri at minka um amparnar.

### 6.6 Burturkast

6.6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi lóggávu og reglugerðir um burturkast og skal latast móttakara við umhvørvisgóðkenning til at viðgera burturkast.

6.6.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum hóska til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa, sí eisini 6.2.4 og 6.2.5.

6.6.3 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum íløtum, ið eru góðkend til endamálið, t.d. UN-góðkendum íløtum.

6.6.4 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki, soleiðis at tað ikki kann koma íbland við annað burturkast og at óviðkomandi ikki sleppa at tí.

6.6.5 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara. Burturkastið skal skiljast sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum.

6.6.6. Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skal verða sett og tryggjað soleiðis, at tað ikki fýkur í vindi.

### 6.7 Óhapp

6.7.1 Um óhapp[8] koma fyri, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu tiltøk beinanvegin setast í verk til at støðga dálkingini, avmarka møguligar fylgjur og at taka dálkandi tilfar upp.

6.7.2 Óhapp, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk og annað sendast Umhvørvisstovuni skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 4 vikur.

### 6.8 Umhvørvisstýring og innaneftirlit

6.8.1 P/F Bakkafrost Freshwater skal hava eina umhvørvisstýriskipan, sum er í samsvari við virksemið og samsvarandi viðurkendum skipanum.

6.8.2 Niðurskrivaðar mannagongdir skulu lýsa umhvørvismál fyri, hvussu felagið kann fyribyrgja, stýra og minka um ávirkan á umhvørvið, og hvussu málini kunnu røkkast. Mannagongdirnar skulu í minsta lagi lýsa:

- hvørji mál virkið hevur sett fyri t.d. at stýra, fyribyrgja og minka um útlát á sjógv og til luft, íroknað óljóð, nøgd av burturkasti og annað,
- á hvønn hátt og hvussu ofta málini verða mátað og endurskoðað,
- stýring av virksemi, sum hevur týdning fyri útlát, íroknað tilbúgvingarskipan fyri dálking og óhapp av týdningi fyri umhvørvið,
- kanningar av útláti, umframt viðlíkahald av reinsiskipanum, viftum og øðrum keldum til dálking, íroknað óljóð,
- skrásetingar av viðkomandi rakstrartølum,

[8] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast Løgregluni (dálking á landi) ella Sjóbjargingarstøðini, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

- skrásetingar, handfaring og viðgerð av frávikum,
- fyribyrging av óhappum og tiltøk at handfara og basa ávirkan av óhappi, og
- upplæring av starvsfólkum við ábyrgd av at fylgja nevndu mannagongdum.

6.8.3 P/F Bakkafrost Freshwater hevur ábyrgd av, at avvarandi starvsfólk kenna viðkomandi partar av umhvørvisstýrisskipanini og tilhoyrandi mannagongdir, sum tey varða av, sí eisini treyt 6.1.1. Innihaldið skal vera lætt at seta seg inn í og so mikið ítøkiligt, at avvarandi starvsfólk vita, hvat tey skulu gera og nær.

6.8.4 Um umhvørvisstýrisskipanin ikki er góðkend av óheftum stovni, skal P/F Bakkafrost Freshwater hava serstakan skoðanarbólk, sum regluliga eftirmetir umhvørvisstýrisskipanina og um og í hvønn mun hon verður nýtt í verki.

6.8.5 Allar kanningar skulu gerast av fólki við neyðugum førleika, meðan virksemið er í gongd.

6.8.6 P/F Bakkafrost Freshwater skal skrivliga eftirmeta øll innanhýsis eftirlit, kanningar, óhapp og frávik av týdningi fyri umhvørvið, og tá tað er viðkomandi, áseta og seta í verk fyribyrgjandi tiltøk.

6.8.7 Umhvørvisstýriskipanin, skjøl, útfyltir kekklistar og annað hesum viðvíkjandi skal til eina og hvørja tíð kunna síggjast av Umhvørvisstovuni eftir umbøn. Eisini kann Umhvørvisstovan til eina og hvørja tíð biðja um avrit av kanningum og frágreiðingum viðvíkjandi útláti, dálking, óhappi ella árinum á umhvørvið, um stovnurin fær ábendingar um, at P/F Bakkafrost Freshwater ikki lýkur treytirnar í hesi góðkenning.

6.8.8 Umhvørvisstovan kann krevja, at P/F Bakkafrost Freshwater ger serligar mátingar ella kanningar, um ábending er um serliga dálking ella fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkseminum. Um máting ella kanningar vísa, at P/F Bakkafrost Freshwater ikki lýkur treytirnar í hesi góðkenning, hevur felagið skyldu til at seta bøtandi tiltøk í verk, so viðkomandi treyt ella treytir verða hildnar.

### 6.9 Rakstrarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

6.9.1 Fyri hvørt ár skal P/F Bakkafrost Freshwater skráseta hesar upplýsingar:

- tal og stødd av framleiddum fiski,
- fóðurnýtsla, framleiðsla og fóðurfaktor,
- nýtsla av vatni ($m^3$/ár),
- nøgd og slag av brúktum heilivági og øðrum viðgerðarevnum og kemikalium,
- nøgd og slag av reingerðarevni og sóttreinsingarevni,
- eftirlit, viðlíkahald og royndarkanning av tangum til brennievni og tilhoyrandi rørskipanum fyri tættleika, umframt møgulig tiltøk í hesum sambandi,
- nøgd av burturkasti, tilskilað eftir slag, íroknað vandamikið/serliga dálkandi burturkast og møgulig evja úr reinsiskipanum, og hvønn tað er latið til,
- rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning,

- onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

6.9.2 P/F Bakkafrost Freshwater skal á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina umhvørvisfrágreiðing, sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingum nevndar í 6.9.1, umframt møguligar aðrar skrásetingar, sum hava týdning fyri umhvørvið,
- kanningarúrslit, sum hava týdning fyri umhvørvið, og viðkomandi tulking av úrslitum, íroknað uppgerð av útlátum tilsamans,
- lýsing, eftirmetingar og tiltøk í sambandi við óhapp og aðrar hendingar, sum hava havt dálking við sær, ella at fiskur er sloppin, og hvussu nógv,
- onnur størri ella afturvendandi frávik, sum kunnu hava týdning fyri umhvørvið,
- avrit av eftirmeting av umhvørvisstýriskipanini og áseting av nýggjum umhvørvismálum,
- framd og ætlað umhvørvistiltøk, fyribyrgjandi ábøtur o.a..

6.9.3. Umhvørvisfrágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mai í avloysandi ári.

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrisfólkið í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Umhvørvismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Skálavíkar kommuna, skalavik@skalavik.fo
Heilsufrøðiliga starvsstovan, hfs@hfs.fo
Búnaðarstovan, bst@bst.fo
Landslæknin, foe@stps.dk

**Fylgiskjal 1. Lýsing av virkseminum**

**Inngangur**

P/F Bakkafrost Freshwater ætlar at byggja eina nýggja smoltstøð í Skálavík til at leggja inn og klekja laksarogn og at framleiða upp í átta milliónir smolt (sjóbúnar laksar) á um 0,5 kg at seta á sjógv.

Í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd við seinni broytingum er fiskaaling í bólki J. nr. 4 í fylgiskjali til lógina um sonevnt serliga dálkandi virksemi, ið krevur umhvørvisgóðkenning.

Sambært § 30 í lógini skulu, saman við umsókn um góðkenning sambært §§ 26-28, verða hjálagdar neyðugar ætlanir, tekningar og frágreiðingar, ið gera ætlanina skilliga, umframt tilskilan av slagi og nøgd av ætlaðu ella verandi dálkingini. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar við tí endamáli at minka um hesa dálking.

**Staðseting**

Tann ætlaða smoltstøðin verður bygd á Bakkavegi 20, matr. nr. 20b í Skálavík, sí mynd 1. Tinglýsta víddin er 39.852 m$^2$. Vatnbrunnar til smoltstøðina verða á matr. nr. 15 c, beint norðan fyri 20b. Tinglýsta víddin av matr. nr. 15c er 5.811 m$^2$. Staðsetingin av smoltstøðini er nærri viðgjørd í fylgiskjali 2.



**Mynd 1.** Staðsetingin av smoltstøðini í vinnuøki C, næst sjónum, í norðaru útryðjuni av Skálavík.

Sambært felagnum er byggiøkið 232 metrar langt og 99 metrar breitt og víddin á ætlaðu bygningunum 21.373 fermetrar ($m^2$).

Mynd 2 vísir ætlaðu bygningarnar á byggibúnaða økinum, ið er um 30 metrar yvir hav.



**Mynd 2.** Yvirlit yvir hallirnar í nýggju smoltstøðini í Skálavík.

**Framleiðslan**

Sambært P/F Bakkafrost Freshwater verður støðin ein samanseting av fimm ymiskum hallum, sí mynd 2, og fer framleiðslan at fylgja gongdini, sum er víst í talvu 1.

Í norðastu høllini verða rogn løgd inn og klakt í einum rognarúmi.

Tann klakti yngulin, ið vigar um 0,2 gramm, verður fluttur í kør í einum øðrum rúmi í sama bygningi, har hann verður byrjanarfóðraður og fær fyrsta vakstrarstig upp til um fimm gramm.

Hetta fer fram í kørum, sum eru fimm metrar í tvørmáti (diametri). Frá hesum verður fiskurin í trimum stigum á tríggjar mánaðir aldur frá fyrst 5 til 50 gramm, síðan frá 50 til 174 gramm, og at enda frá 174 gramm til eina miðalstødd á um 0,5 kg.

Tað fyrsta vakstrarstigið eftir byrjanarfóðringina, t.e. frá 5 til 50 gramm fer eisini fram í tí norðasta bygninginum, í kørum, sum eru tíggju metrar í tvørmáti.

Tær tvær næstnorðastu hallirnar eru til næsta vakstrarstig, t.e. frá 50 til 174 gramm, sum fer fram í kørum, sum eru 14 metrar í tvørmáti.

Tær báðar syðstu hallirnar eru til triðja vakstrarstig frá 174 til 500 gramm og fer fram í kørum, sum eru 20 metrar í tvørmáti.

**Talva 1.** Framleiðslustig á nýggju smoltstøðini

| **Framleiðslurúm/-stig** | **Miðalvekt (gr)** | **Diametur á kørum (m)** | **Tíð (mánaðir)** |
|---|---|---|---|
| Rognarúm | | | |
| Byrjanarfóðring | 0,2 – 5 gr | 5 m | 3 mánaðir |
| 1. vakstrarstig | 5 – 50 gr | 10 m | 3 mánaðir |
| 2. vakstrarstig | 50 – 174 gr | 14 m | 3 mánaðir |
| 3. vakstrarstig | 174 – 500 gr | 20 m | 3 mánaðir |

Tann árliga framleiðslan er 4.000 tons og árliga fóðurnýtslan er 4.000 tons.

Smoltstøðin verður útgjørd við RAS-endurnýtsluskipan, sum væntast at endurnýta umleið 98% av vatninum.

Tá støðin verður tikin í nýtslu er væntandi, at vanliga vatnnýtslan svarar til eina árliga vatnnýtslu á 1.370.000 rúmmetrum ($m^3$). Tað samsvarar við stívliga 3.753 $m^3$ um dagin og 156 $m^3$ um tíman.

So hvørt vatnreinsingin í biofiltrunum við niðurbróting av evnum, ið innihalda køvievni (N) er fingin at virka, verður nógv tann størsti parturin av vatninum alsamt endurnýttur, sum kann

lækka tann árliga tørvin á nýggjum vatni til um 233.000 $m^3$. Tá støðin verður rikin við fullari denitrifikation, væntar felagið at vatnnýtslan verður umleið 26 $m^3$ um tíman.

Ein partur av vatninum guvar burtur úr kørunum og undir vatnreinsingini, og væntar felagið, at mongdin av spillvatni, sum árliga verður leidd á sjógv, verður um 139.000 $m^3$.

Felagið metir, at 0,7 % av turrevni verður í spillvatninum, og at árliga mongdin av turrevni, sum verður leidd á sjógv, verður 973 tons.

Væntaða orkunýtslan verður 24 Gigawatttímar (GWh) um árið.

Við vanligan rakstur verður støðuga óljóðið við mark til nærmasta bústaðarøki sambært eftirgerð (simulering) av óljóði í mesta lagi 35 dB(A).

Tá verklagið til neyðstreym verður royndarkoyrt, væntast óljóðsstøðið at gerast 65 dB(A).

Talva 2 vísir tey omanfyri nevndu lyklatølini fyri ætlaðu smoltstøðina í Skálavík.

**Talva 2.** Lyklatøl fyri framleiðsluna á nýggju smoltstøðini í Skálavík

| **Parametur** | **Eind** | **Nøgd** |
|---|---|---|
| Biomassi | Tons/ár | 4.000 |
| Smolt | Stk./ár | 8 mió. |
| Vatnnýtsla áðrenn vatnreinsingin er fingin at virka | $m^3$/ár | 1.370.000[1)] |
| Vatnnýtsla við fulla denitrifikatión | $m^3$/ár | 233.000[2)] |
| Orkunýtsla, Gigawatttímar um árið | GWh/ár | 24[3)] |
| Spillvatn frá yvirrensli í partikkulfiltrum | $m^3$/ár | 1.231.000[4)] |
| Spillvatn, ið verður leitt á sjógv | $m^3$/ár | 139.000[5)] |
| Turrevni í spillvatni, sum verður leitt á sjógv | tons/ár | 973[6)] |
| Støðugt óljóð | dB(A) | 35[7)] |
| Mett óljóð tá neyðsteymsverklag verður royndarkoyrt | dB(A)a | 65[8)] |
| Vídd | m2 | 21.373 |
| Kør, rúmd | m3 | 29.120 |

[1)] Mett eftir ætlaða fóðurnýtslu, tørvi á 300 L/kg fóður og roknað eftir 325 d/ár og í miðal 60% av fullum rakstri
[2)] Mett eftir tørvi á 30 L/kg fóður, roknað eftir 325 dagar/ár og í miðal 60% av fullum rakstri
[3)] Mett nýtsla, tá øll støðin er í nýtslu og orkutørvurin er av tí mesta.
[4)] Mett eftir muninum á inntøkuvatni og spillvatnsleiðingini frá trumlufiltrinum
[5)] Roknað eftir framleiðslu í 325 dagar/ár og og miðal 60% av fullum rakstri
[6)] Mett eftir at 0,7 % turrevni er í spillvatninum
[7)] Óljóð við nærmasta granna, roknað eftir máting á øðrum verklagi hjá Nofitech
[8)] Mett eftir datablaði frá líknandi neyðstreymsverklagi

### Vatntøka

Vatnið verður eftir ætlan tikið í tveimum støðum í hagapartinum Heimastahagi – Norðaripartur, matrikkul nr. 162. Byrgingar verða gjørdar tvørturum Núpsá og Ánna Nýggju. Frá byrgingunum verða vatnleiðingar eftir ætlan gjørdar, sum tilsamans eru um 2.600 metrar.

P/F Bakkafrost Freshwater metir, at báðar áirnar undir vanligum umstøðum klára at veita um 100-200 rúmmetrar ($m^3$) av vatni um tíman, ið eftir tí upplýsta er úr fýra upp í átta ferðir meiri

enn tørvurin hjá smoltstøðini við fulla framleiðslu, tá støðin er komin at koyra við fulla denitrifikatión.

Í turrum veðri veita báðar áirnar tilsamans um 100 m$^3$ um tíman við um 45 % ella slakari helvt frá Ánni Nýggju og 55 % ella stívliga helvtini frá Núpsá.

Tá ið meiri avfall er, veita báðar áirnar upp ímóti 600 m$^3$/tíma. Tá gerst Núpsá nógv størri, og kann lutfallið væntast at vera um triðingurin frá Ánni Nýggju og tveir triðingar frá Núpsá.

Skálavíkar Kommuna ætlar at knýta vatnveitingina úr haganum uppí kommunalu vatnleiðingina, soleiðis at trygdin og fleksibiliteturin verður betri. Ein vatngoymsla verður eftir ætlan eisini bygd í Skálavík, sum skal klára at halda 10.000 m$^3$ av vatni.

Í mynd 3 vísir tann norðari reyði prikkurin ovari í myndini vinstru megin ætlaðu vatnbyrgingina í Núpsá, tann syðri ætlaðu vatnbyrgingina við Ánna Nýggju.




**Mynd 3.** Vatnveiting til smoltstøðina. Norðari reyði prikkurin er Núpsá, tann syðri Áin Nýggja. Høgru megin síggjast fýra ymiskar leiðir til vatnrørini.

Í umsóknini er skitsuuppskot til byrgingar í ánni Núpsá og Ánni Nýggju og staðseting av vatnleiðing til smoltstøð.

## Orkunýtsla

Á sjóbúningarstøðini í Skálavík verður í høvuðsheitum nýtt el, og verður avlopshiti frá framleiðsluni nýttur til at hita støðina. Samlaða orkunýtslan er um 24 GWh/ár. Oljuriknir ravmagnsgerarar (neyðstreymsgeneratorar) verða til at gera streym, tá streymslit koma fyri.

Tann reyði ringurin í mynd 4 vísir staðsetingina av ravmagnsgerarum. Hetta er á norðursíðuni á støðini.



**Mynd 4.** Ravmagnsgerarar (neyðstreymsgeneratorar) eru á norðursíðuni av støðini, her víst við reyðum ringi

Felagið ætlar at hava tveir niðurgrivnar oljutangar, hvør á 40.000 litrar, sum eftir ætlan verða grivnir niður uttan fyri har, sum neyðstreymsgeneratorarnir eru staðsettir. P/F Bakkafrost Freshwater upplýsir, at sandur verður lagdur rundan um tangarnar og mold omaná aftur.

Treytir verða settar til óljóð frá m.a. ravmagnsgerarum og til góðkenning, uppsetan ella niðurgraving, íbinding og áfylling av oljutangum.

## Evnafrøðilig (kemisk) evni og vatnviðgerð

P/F Bakkafrost Freshwater upplýsir, at á støðini fara at verða nýtt fleiri ymisk kemisk evni í sambandi við framleiðslu og vasking.

Fyri at fyribyrgja smittu og tálma soppavøkstri verða partiklar í inntøkuvatninum soldaðir frá í partikkulfiltrum, og verður vatnið síðani sóttreinsað. Áðrenn vatnið verður slept inn til fiskin, verður tað viðgjørt við at strála vatnið við UV ella við at tilseta Ozon ($O_3$).

Í meginpartinum av framleiðsluni verður brúkt og skitið vatn reinsað og endurnýtt í sonevnt Recirculatory Aquaculture System (RAS), har livandi biofiltur reinsa vatnið, sum ger tað møguligt at endurnýta og minka um nýtsluna av vatni og at halda hita og umhvørvið í vatninum so javnt sum gjørligt.

Tó verður vatn, sum verður nýtt í klekingini av rognum ikki endurnýtt, hetta fyri at forða fyri spjaðing av møguligari smittu. Rogn krevja eisini sera høga vatngóðsku við høgum innihaldi av súrevni ($O_2$) og eru eyka viðbrekin og torfør at viðgera fyri sopp.

Fyri at stuðla tilgongdini í biofiltrunum fóðrar P/F Bakkafrost Freshwater tey við ammonium ($NH4^+$) og methanol ($CH_3OH$).

Fiskurin er viðbrekin fyri ov høgum ella lágum ella ov sveiggjandi pH, ið eisini kann gera tey upploystu gassini meiri og minni eitrandi. Fyri at tryggja fiskinum javnar umstøður og at áðurnevnda niðurbróting av evnum, ið innihalda køvievni (N), er vælvirkandi, verður pH neyvt stýrt við kaustisk soda (natrium hydroxid, NaOH) og í serligum førum saltsýru (HCl). Kaustisk soda kann eisini verða nýtt í sambandi við sóttreinsing, m.a. av hitavekslarum.Kaustisk soda og saltsýra verða áfylt sum flótandi veskur í lokaðum skipanum. Í sambandi við áfylling krevja øll evnini til at stýra pH persónliga verndarútgerð og at verða handfarin við varsemi.

Formalin ($CH_2O$) verður brúkt ímóti soppi. Salt (NaCl) kann verða nýtt til at fyribyrgja ella viðgera ímóti soppi og í støðum við høgum nitritti. Sápa verður brúkt til reingerð. Meyrusýra ($CH_2O_2$) verður nýtt til súrløgu av deyðum fiski.

Stórur munur er á nøgdini av evnum, sum verða brúkt. Kaustisk soda verður brúkt í stórum nøgdum og verður tí goymt í goymslurúmi. Doyvingarevnið Finquel verður brúkt í smærri nøgdum og verður goymt í serligum skápum. Goymslurnar eru útgjørdar við útlufting og føstum gólvi.

Undir framleiðsluni verður fiskurin koppsettur við koppsetingarmaskinum og kann eisini verða viðgjørdur ímóti soppi og sjúkum.

Í Talvu 3 er yvirlit yvir evni, ið verða brúkt á smoltstøðum hjá P/F Bakkafrost Freshwater. Felagið upplýsir, at nýggja støðin í Skálavík fer at brúka fleiri - um ikki øll - av hesum evnum.

**Talva 3.** Yvirlit yvir evnafrøðilig (kemisk) evni og endamálið við teimum.

| Evnafrøðilig (kemisk) evni / IUPAC ID (frymil) | Endamál |
|---|---|
| Kaustisk soda/NatriumHydroxid (NaOH) | At stilla pH og at sóttreinsa |
| Saltsýra/HydrogenKlorid (HCl) | At stilla pH |
| Salt/NatriumKlorid (NaCl) | At stilla nitrit & tálma soppi |
| Formalin/tynnt formaldehyd ($CH_2O$) | At tálma soppi |
| Ozon/Trioxygen ($O_3$) | At reinsa vatn |
| Meyrusýra/Methansyre/Formic Acid ($CH_2O_2$) | Súrløga til deyðan fisk |
| S1 & S2 (vørumerki av sápu frá felagnum Kemilux) | At vaska við |
| Oxidan extra (Vørumerki) | At sóttreinsa |
| Finquel (Vørumerki) | At doyva og avlíva |
| Kloramin/Monochloramin ($NH_2Cl$) | At fyribyrgja/viðgera táknibruna |
| Ammonium/Ammonium ion ($NH_4^+$) | At fóðra biofiltur |
| Methanol ($CH_3OH$) | At fóðra biofiltur |
| Skamtar | At koppseta fisk |

Treytir verða settar til innrætting og goymslu av evnafrøðiligum (kemiskum) evnum.

Av evnunum, sum P/F Bakkafrost Freshwater sambært talvu 3 vanliga nýtir á sínum støðum, er serliga evnið formalin ($CH_2O$) mett skaðiligt og undir illgruna fyri at vera krabbaelvandi. Nógv av hinum evnunum í nevndu talvuni eru eisini at finna í náttúruni í lægri styrki, og kunnu undir og eftir viðgerðina verða niðurbrotin og/ella tynt nógv og kunnu á tann hátt gerast óskaðilig ella lutfalsliga óskaðilig, áðrenn tey verða slept á sjógv.

Tað frásoldaða filtratið frá partikkulfiltrum verður vanliga leitt í spillvatnskipanina.

## Spillvatn

Smoltstøðin verður útgjørd við bio-filtri, sum skal reinsa spillvatnið. Mett verður, at umleið 96.000 $m^3$ av spillvatni fara frá bio-filtrinum og verður síðan leitt út á sjógv. Tann árliga framleiðslan og fóðurnýtslan á 4.000 tons svarar til áleið 972 tons av skarni og fóðurleivdum. Felagið ætlar at staðseta munnan av spillvatnsleiðingini frá støðini soleiðis, at rákið í sjónum syrgir fyri, at eingin upphópan sæst á botninum. Eitt hol verður borað ígjøgnum helluna frá smoltstøðini oman á umleið 6-8 metrar dýpi. Síðan verður rørið ført eftir botninum, til tað kemur á 15 metra dýpi. Fyri at halda rørið upp á pláss á havbotninum verða stálboylar, sum liggja tvørtur um rørið, skrúvaðir niður í hellubotnin, og við millumbilum verða søkk løgd oman á og rundan um rørið.

Í mynd 5 vinstru megin sæst, hvønn veg felagið ætlar at leggja frárenslið frá støðini. Høgru megin vísir reyða frámerkið, har sum tað kemur út á leið á 15 metra dýpdarkurvuni.



**Mynd 5.** Staðseting av frárenslurørinum frá smoltstøðini S-26 Skálavík

Treytir verða settar til spillvatn og kanning av hesum.

## Ljós og Luft

Smoltstøðin hevur onga uttandura ljóskeldu, undantikið lyktapelar uttanfyri. Endamálið er at ávirka fiskin inni í høllunum so lítið sum møguligt, og tí eru næstan eingi vindeygu á smoltstøðini, sum annars kundu virka sum ljóskeldur. Harafturat metir felagið, at eingin luftdálking verður frá smoltstøðini. Har verður eingin oljufýring, og framleiðslan gevur ongan lukt frá sær.

**Óljóð**

Á støðini í Skálavík fara sambært felagnum at vera viftur til at fáa koltvíiltu ($CO_2$) úr vatninum ($CO_2$ -avgassing), og verður á hvørjum bygningi vifta, sum leiðir $CO_2$-gassið útum bygningin, sum saman við motorum fara at geva áhaldandi óljóð frá sær.

Óstøðugt óljóð fer eisini at koma frá ferðslu á økinum í sambandi við veiting av vørum og arbeiði á økinum, t.d. trukkar, og frá einari ravmagnseind (neyðstreymsgeneratori), ið verður roynd í upp til umleið ein tíma um vikuna, umframt at skipanin tekur við, tá streymslit er frá el-netinum.

Viðurskiftini kring óljóð verða viðgjørd nærri í fylgiskjali 2: *Lýsing av umhvørvisviðurskiftum.*

**Burturkast**

P/F Bakkafrost Freshwater upplýsir, at tað mesta av burturkastinum er vanligt tilfar, sum verður brent ella endurnýtt, at kemisk evni harafturat verða nýtt í framleiðsluni, og at tóm íløt og restir av kemiskum evnum verða burturbeindar eftir mannagongdum í samstarvi við IRF og Tjaldurs Apotek. Deyð smolt verða kvarnað, og súrløgan verður heintað av Førka. Í løtuni er eingin ætlan um at frásolda skarn.

**Goymslur**

Ymiskt er, hvussu tey ymsu evnafrøðiligu evnini verða goymd. Evni, sum verða brúkt í stórum mongdum, eitt nú kaustisk soda, verða goymd í goymslurúmi, og evnir, sum verða nýtt í meiri avmarkaðum mongdum, t.d. dyvingarevnið Finquel, verða goymd í serligum skápum. Goymslurnar eru útgjørdar við útlufting og føstum gólvi.

Treytir verða settar um trygd og tættleika av goymslum.

**Innaneftirlit**

Sambært P/F Bakkafrost Freshwater verður innaneftirlitið gjørt í samsvari við góðskuskipanina, sum felagið brúkar. Í umhvørvisgóðkenningini eru minstakrøv til innaneftirlit, íroknað tilbúgving.

## Fylgiskjal 2: Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Vísandi til § 31 í umhvørvisverndarlógini skal góðkenning sambært §§ 26-28 innihalda áseting av teimum umstøðum, ið lagdar eru til grund fyri góðkenningina, her uppi í støðu av fyritøkuni, virkinum ella útbúnaðinum á føstu ognini, og tær atgerðir, ið virkið hevur sagt frá, at tað vil fremja ímóti dálking. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar fyri at minka um dálkingina.

Í hesum parti verða umhvørvisviðurskiftini lýst til tess at fáa greiði á, hvørjar treytir skulu setast til virksemið. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftum er mesti dentur lagdur á at minka um dálking og ampar frá útláti av spillvatni, larmi frá virkseminum, og at minka um árin frá dálking við olju og evnafrøðiligum (kemiskum) evnum vegna óhapp. Metingin av umhvørvisviðurskiftunum er grundað á, at virkið fer at brúka í mesta lagi 4.000 tons av fóðri um árið. Allar viðkomandi treytir eru settar upp í kapitli 6: Góðkenningartreytir.

### Staðseting

Tann nýggja støðin verður á Bakkavegi 20, matr. nr. 20b í Skálavík.

Býarskipanarnevndin viðmælti í skrivi frá 25. november 2019 uppskot frá Skálavíkar kommunu um at leggja út nýtt C-øki til vinnu- og ídnaðarendamál norðanfyri í bygdini við tilhoyrandi vegi. Umhvørvis- og vinnumálaráðið veitti 5. apríl 2022 Skálavíkar kommunu góðkenning av broytingini, sí góðkennandi átekning í mynd 1 høgru megin.



**Mynd 1.** Vinstru megin staðseting av støðini í norðara útjaðara av Skálavík. Høgru megin matrikkulkort við áteknaða góðkenning tann 5/4-2022 av vinnuøki-C til ætlaðu støðina

Fyri øki C til vinnu og ídnað ásetir § 15 í byggisamtyktini hjá Skálavíkar kommunu:

1. Økið verður lagt av til vinnuvirki, t.e. heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir, ídnað, alivinnu og til tænastuvirksemi í sambandi við tey, bilstøðlar o.t. Í serstøkum førum verður loyvt at innrætta íbúð til virkiseigaran ella starvsfólk.

2. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 800 $m^2$ til støddar.

3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,7.

4. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 12 m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

Umhvørvisstovan hevur áður, í 2020, viðgjørt eina umsókn frá P/F Bakkafrost um at byggja eina lívfiskastøð á sama matrikli, sum fekk umhvørvisgóðkenning 22. desember 2022.

Ætlanin um lívfiskastøð bleiv seinni slept, men verður sama staðseting og tað byggibúnaða økið til støðina nýtt í teirri nýggju ætlanini um smolt-/sjóbúningarstøð.

Tann tinglýsta víddin á 20b er 39.852 $m^2$. Sambært felagnum er byggiøkið 232 metrar langt og 99 breitt og víddin á ætlaðu bygningunum 21.373 $m^2$. Byggihæddin sæst at vera í mesta lagi 11,5 metrar (yvir jørðildið).

Í sambandi við býarætlanararbeiði verður dentur lagdur á at hava hóskandi frástøðu frá sethúsa- og frítíðarhúsaøkjum til serliga dálkandi kapittul-5-vinnu, serstakliga vinnu, sum letur frá sær óljóð og luftdálking. Í vegleiðing *13/2001: Vegleiðing um óljóð* frá Umhvørvisstovuni stendur m.a.: "*Um vinnuøki markar til bústaðarøki, má larmandi virksemi staðsetast soleiðis, at tað ikki elvir til meira óljóð í bústaðarøkinum enn ásett í talvu 1*[9]. *Tað er tí av stórum týdningi, at kommunan í síni byggisamtykt tekur hædd fyri staðseting av vinnu- og bústaðarøkjum, og hvønn ampa vinnuligt virksemi kann hava á bústaðarøki*".

Staðsetingin í teirri fyrru umsóknini frá P/F Bakkafrost um góðkenning av lívfiskastøð á staðnum var grundgivin við tøkt byggilendi við stórari fjarstøðu frá aðrari aling og frá bústaðarøkjum og við góðum møguleikum fyri vatntøku.

Tá broytingin í byggisamtyktini varð góðkend, var fjarstøðan til nærmasta bústaðarøki 4 metrar. Skálavíkar kommuna hevur eftirsíðan broytt eitt lítið øki burturav tí nærmasta bústaðarøkinum ímóti bygdini til at vera vegur og atkomuøki, sí mynd 2 og 3.




**Mynd 2.** Reyði krossurin vísir partin av nærmasta bústaðarøki, ið er lagt av til veg

[9] Sí eisini talvu 1 og 2 í umhvørvisgóðkenningini




**Mynd 3.** Matr. 20b og serstakta ferðsluøkið sunnan fyri hesum, sum ásett av Skálavíkar kommunu

Eftir broytingina er fjarstøðan frá smoltstøðini, matr. 20b, til tey nærmastu økini, sum Skálavíkar kommuna áður í byggisamtykt hevur lagt út til bústaðarøki, ávikavist 23, 38 og 62 metrar, ið framvegis er væl nærri bústaðarøki, enn aðrar nýggjari støðir, ið hava eins stórt virksemi.

Fjarstøðan til nærmasta virki, sum virkar ella hevur virkað fisk, er um ein hálvan km[10].

**Óljóð**

Vinnuvirki skulu lúka treytir um óljóð í grannalagnum.

Vanligt óljóð frá virkjum og flutningi verður í høvuðsheitum roknað at vera í ljóðøkinum millum 200 og 1.000 Hz.

Galdandi mørk fyri óljóði (óljóðstyngd) eru í góðkenningarskrivinum undir nr. *6.5 Óljóð, ristingar og ljós*.

Serliga dálkandi kapittul-5-virkir skulu staðsetast í vinnuøkjum, sum eftir meting kunnu býtast í vinnuøki 1 og 2 viðvíkjandi útláti og dámi, sí lýsingarnar av vinnuøki 1 og 2 í talvu 2 í umhvørvisgóðkenningini. Verður dømi tikið í vinnufyritøku í vinnuøki 1, har larmandi virksemi kann fara fram, kann vinnuvirksemi í mesta lagi elva til óljóð við grannamark upp til 70 dB (A) og í mesta lagi upp til 60 dB (A) í vinnuøki 2, har minni larmandi virksemi kann fara fram[11].

Við upplýsingum um slag og staðseting av óljóðskeldum hevur ráðgevingarfelagið Multiconsult við 2023-útgávuni av forritinum CadnaA eftirgjørt (simulerað)[12] væntaða óljóðið. Støðugt óljóð verður frá kompressarum til at gera súrevni ($O_2$) og frá blásarum, sum blanda luft í vatnið fyri at fáa koltvíevni ($CO_2$) at guva burtur ($CO_2$ -avgassing). Á hvørjum bygningi verður vifta, sum leiðir $CO_2$-gassið útum bygningin, ið saman við viftumotorinum fer at geva áhaldandi óljóð frá sær.

Óstøðugt óljóð fer eisini at koma frá ferðslu á økinum í sambandi við veiting av vørum og arbeiði á økinum, t.d. trukkar, og frá ravmagnseind (neyðstreymsgeneratori), ið tekur við, tá streymslit er frá el-netinum. Umframt nýtslu í sambandi við streymslit verða ravmagnseindir til neyðstreym royndarkoyrdar eina ferð um vikuna, í mesta lagi verður í 1-2 tímar hvørja ferð og færri enn 100 tímar um árið samanlagt.

Ætlaða framleiðslan á um 4.000 tons av fiski um árið fer at krevja umleið sama tonsatal av fóðri, ið samsvarar við 1-2 lastbilar við fóðri um dagin. Hvør veiting væntast í mesta lagi at vara 1 tíma.

P/F Bakkafrost Freshwater væntar, at ravmagnseindir til at gera streym í samband við streymslit og blásarar til avgassarar verða tær týdningarmestu keldurnar til óljóð.

[10] Sambært § 9 í kunngerð nr. 80 frá 14. juni 2019 um stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur, skal frástøða á í minsta lagi 1 km vera millum alistøð, landstøðir ella virki, sum hava við alifisk at gera, ella til aðra alistøð, sum nýtir vatn.

[11] Nærri frágreiðing um tulking av markvirðum fyri óljóði er í vegleiðingum frá Miljøstyrelsen: *Ekstern støj fra virksomheder, vejledning nr.5/1984 Lavfrekvent støj, infralyd og vibrationer i eksternt miljø: nr.9/1997*

[12] Multiconsult 18. august 2023/01. Støykartlegging landbasert akvakulturanlegg ved Skálavíkar, Færøyene

Mynd 4 vísir ætlaðu støðina og sunnan fyri hesa staðsetingina av nærmastu húsaognum.



**Mynd 4**. Yvirlit yvir støðina og kringliggjandi húsaognirnar. Viftur eru merktar við bláum, tó er vifta suðureftir á tí syðsta bygninginum næst bygdini víst sum reyður ringur. Teir smærru reyðu ringarnir vísa vørumóttøkur (frá Multiconsult: Støykartlegging 18.08.2023/01).

P/F Bakkafrost Freshwater hevur upplýst, at neyðugt er at hava eina viftu á suðursíðuni á tí syðsta bygninginum, sum vendir ímóti bygdini og teimum nærmastu bústaðarøkjunum har. Út

frá upplýsingunum um óljóðskeldur, og hvar hesar eru staðsettar, hevur ráðgevingarfelagið Multiconsult gjørt ljóðeftirgerðir (simuleringar)[13] við 2023-útgávuni av forritinum CadnaA Sambært hesum væntast óljóðið (lydeffekt $L_{wA}$) av einari ljóðdoyvdari viftu á syðsta bygninginum at gerðast 73 dB, mátað við ljóðkelduna.

Sambært norsku vegleiðingina fyri óljóð metti Multiconsult fyrst um óljóð við fasadur á bygningum, har sum mestur ampi av óljóði kann væntast. Útrokningarhædd fyri ljóðbreiðsluna var 4 metrar yvir lendið (jørðildið).

Serligur dentur er lagdur á syðsta bygning, sum liggur nærmast bygdum øki. Á hesum vendir viftan suðureftir ímóti bygdum øki. Felagið metir, at hetta er størsta kelda av óljóði fyri húsarhald í Skálavík, men at tað av tekniskum orsøkum ikki ber til at flyta viftuna á syðsta bygninginum til eystaru síðu, t.e. ímóti sjónum. Í útrokningunum er støði tikið í, at allar viftur hava 5 dB ljóðdoyving.

Mynd 5 vísir dømi um viftuslag við motori og ljóðdoyvara, sum fylgdi við umsóknini frá P/F Bakkafrost Freshwater. Á myndini síggjast motorar og viftur at vera staðsettar uttandura.




**Mynd 5.** Dømi um uppbygnað av ætlaðum viftuslagi við motori og ljóðdoyvara

[13] Multiconsult 18. august 2023/01. Støykartlegging landbasert akvakulturanlegg ved Skálavíkar, Færøyene

Mynd 6 vísir roknaða ljóðbreiðslu og óljóðsstøði við fasadur sunnu- og halgidagar ($L_{de}$) við 5 dB eyka ljóðdoyving fyri viftuna við tann syðsta bygningin og 3 dB eyka ljóðdoyving av tilhoyrandi motori staðsettur uttandura.




**Mynd 6.** Roknað óljóðsstøði við fasadur sunnu- og halgidagar ($L_{de}$) við 5 dB eyka ljóðdoyving á suðurvenda viftu viftu á syðsta bygninginum og 3 dB eyka ljóðdoyving fyri tilhoyrandi motorar. Útrokningarhædd fyri ljóðbreiðsluna er 4 metrar yvir lendið.

Av tølunum á bygningunum nærmast støðini sæst, at tað kann vera avbjóðandi at halda galdandi markvirðir við fasadurnar á nærmastu húsaognum, sum venda ímóti støðini, við tað at roknaða óljóðsstøðið í støðum fer eitt vet upp um markvirðið á 35 dB(A), sjálvt tá eyka ljóðdoyvarar verða nýttir.

At rokna óljóðsstøði við fasadur kann vegleiðandi geva eina fatan av óljóðsstøðinum í verandi bústøðum. Markvirðini galda tó við næsta grannamark, í hesum førinum við matrikulmarkið til økir, ið eru góðkend til bústaðarøkir. Markvirðini hava týdning fyri eitt nú møguleika fyri útilívi í bústaðar- og frítíðarhúsøkjum uttan óneyðugt órógv. Eisini kunnu, sambært byggisamtyktini, nýggj hús seinni koma nærri støðini.

Umhvørvisstovan hevur sett treyt um nýggjar eftirgerðir (simuleringar) av óljóði við grannamørk til góðkend bústaðarøki. Nýggju útrokningarnar[14] eru gjørdar fyri ljóðútbreiðslu 1,5 metur yvir jørðildi.

Í høvuðsheitum vísa útrokningarnar, at um motorurin til viftuna á tí syðsta bygninginum sum ætlað verður settur uttandura, kunnu galdandi mørk ikki haldast við matrikkulmarkið til grannaøkini, sjálvt við eyka ljóðdoyving av viftuni á 5 dB. Verður motorurin til viftuna á syðsta bygninginum hinvegin staðsettur innandura, vísa útrokningarnar, at galdandi mørk

[14] Multiconsult 4. okt. 2024 / 02. Stoykartlegging landbasert akvakulturanlegg ved Skálavíkar, Færøyene

kunnu haldast. Multiconsult hevði fyrst roknað við at motorurin kundi staðsetast uttandura til viftuna á syðsta bygninginum næst bygdini (bygg D). Í talvu 1 hevur Multiconsult í staðin staðsett motorin til viftuna innandura.

**Talva 1.** Óljóðkelda, óljóðtyngd og tíð/dag (frá Multiconsult: Støykartlegging 04.10.2024/02)

| Støykilde | Lydeffekt $L_{wA}$ | Varighet [minutter] | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Dag kl. 07-18 | Kveld kl. 18-22 | Natt kl. 22-07 |
| Vifte, Ø20 | 78 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Vifte, Ø20 ekstra dempet (bygg D) | 73 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Vifte, Ø14/Tilvekst | 76 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Vifte, startforing 1 | 71 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Vifte, startforing 2 | 64 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Motor, Ø20 | 76 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Motor, Ø14/tilvekst | 74 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Motor, startforing 1 | 67 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Motor, startforing 2 | 65 dB | Kontinuerlig | Kontinuerlig | Kontinuerlig |
| Nødstrømgenerator | 108 dB | 60 | 0 | 60 |
| Kjøring med tunge kjøretøy på området | 109 dB | 30 | 0 | 0 |
| Fôrleveranse og saltleveranse | 109 dB | 60 min per leveranse | 0 | 0 |

Nýggja ljóðeftirgerðin vísir væntaðar ljóðmyndir ymsar tíðir á samdøgrinum.

Í mynd 7 vísir tann reyði ringurin ovast í myndini viftu á endanum av syðsta bygninginum, sum vendir ímóti bygdini, og sum er tann týdningarmesta keldan til óljóð. Í tí ljósagrøna økinum næst tí reyða ringinum væntast óljóð yvir 50 desibel (dB). Í tí næst fylgjandi myrkara grøna økinum uttanum hetta væntast óljóðið at vera yvir 45 dB. Í tí næsta ljósagráa økinum væntast støðið á óljóði at vera yvir 40 dB, í tí myrkagráa yvir 35 dB og í hvítum øki at vera undir 35 dB.




**Mynd 7.** Litaðu økini vísa mørkini fyri roknaða útbreiðslu av óljóði á nátt við 5 dB eyka ljóðdoyving av viftu á syðsta bygninginum og við uttandura staðseting av viftumotori

Mynd 8 vísir, at við 5 dB eyka ljóðdoyving á suðurvendu viftuni á syðsta bygninginum, og tá motorurin til viftuna er staðsettur innandura, kunnu galdandi mørk haldast við matrikulmarkið til bústaðarøkini.




**Mynd 8**. Mørk fyri útbreiðslu av óljóði á náttartíð við 5 dB eyka ljóðdoyving av viftu á syðsta bygninginum og við innandura staðseting av viftumotori

Samanumtikið vísa ljóðeftirgerðirnar hjá Multiconsult, at við uttandura staðsettum motori til viftuna og við vanligari ljóðdoyving av hesum, høvdu krøvini um óljóð ikki verið hildin, men at krøvini kunnu haldast, um tann ætlaði motorurin til viftuna verður ljóðdoyvdur og staðsettur innandura.

Treyt er sett um, at ravmagnsgerarar (generatorar) til at framleiða el, tá streymslit er, skulu royndarkoyrast yrkadagar millum kl. 07 og 18. Óljóðið frá hesum verður býtt við 8 tímar og

lagt afturat ljóðinum frá øðrum ljóðkeldum. Tað sama verður gjørt við óljóð í sambandi við veitingar.

Óljóð frá øðrum ljóðkeldum, eitt nú frá ravmagnsgerara (neyðstreymsgeneratori), verður lagt afturat ljóðstøðinum frá varandi ljóðkeldum. Óljóð frá óstøðugum ljóðkeldum kann í dagtímunum javnast yvir 4 til 8 tímar fyri á tann hátt at lúka galdandi mørk sambært talvu 2. Tó skulu krøvini til óljóð við grannamark til bústaðarøki eisini haldast millum kl. 18 og 07, tá slíkt óljóð verður lagt afturat uttan at javna tað yvir tímar. Tí skulu ravmagnsgerarar verða staðsettir og/ella ljóðdoyvdir soleiðis, at krøvini í talvu 2 kunnu lúkast, eisini tá streymslit er millum kl. 18 og 07, tá óljóðið frá hesum ikki kann verða javnað yvir fleiri tímar.

Í vestara parti av matrikkul 20b og í útsynningshorninum, sum vendir ímóti bústaðarøkjunum, sæst nakað av hæddarmuni at vera frá tí planeraða stykkinum upp til upprunaliga lendið kring ætlaðu støðina. Av ljóðeftirgerðini sæst ikki, um roknað er við afturljóði frá uttandura yvirflatum íroknað lendinum kring bygningar, frá beninum kring støðina og bygningum, og hvussu hetta ávirkar støðið á óljóði.

Fyri at tryggja, at galdandi markvirði fyri óljóð verða hildin í verki, setur Umhvørvisstovan treyt um, at P/F Bakkafrost Freshwater letur gera kanningar av veruliga óljóðstøðinum, tá støðin verður tikin í nýtslu við fullari inniløgu. Verða markvirðini ikki hildin, skal P/F Bakkafrost Freshwater senda Umhvørvisstovuni ætlan um, hvussu galdandi mørk kunnu lúkast við tíðarætlan, ið skal leggja upp til skjótast gjørligt at seta neyðug tiltøk í verk.

Treytir eru settar um, at verða ampar av óljóði seinni, t.d. vegna slit á motorum og/ella ventilatorum, kann Umhvørvisstovan krevja ljóðkanningar, og at munadygg tiltøk verða sett í verk fyri at minka um óljóðstøðið.

### Orkunýtsla

Landstøðir til at framleiða smolt og sjóbúnan laksafisk eru millum størstu orkunýtarar.

Tann stóri parturin av orkunýtsluni hjá støðum til at framleiða smolt/sjóbúnan laksafisk fer til at pumpa, reinsa og endurvinna vatn, sum eisini økir hitan á vatninum og kann hava við sær tørv á at køla vatnið.

Ein annar partur av orkunýtsluni fer til ljós, bæði til ta vanligu framleiðsluna, men eisini fyri at stýra sjóbúningina.

Við at ljósstýra fæst laksur á kynbótastøðum at gýta alt árið, sum ger tað møguligt støðugt at gagnnýta øll rúm á smoltstøðum og at seta fiska á sjógv allar árstíðir. Fyri at hitin ikki skal gerast hægri enn rognini tola, og eisini í seinni vakstrarstigum, er tíðum neyðugt at køla vatnið, sum sera nógv orka krevst til.

Eisini í øðrum pørtum av framleiðsluni verður orka nýtt til at hita ella køla vatnið, soleiðis at tað tryggjar best møguligan vøkstur, men eisini tryggjar heilsuni hjá fiskinum, ið við ov heitum vatni og ov skjótum vøkstri kann ávirka fiskin neiliga, eisini eftir at hann er farin á sjógv.

## Roykur

Eingin olja verður brúkt til upphiting á støðini. Í staðin verður el-orka brúkt til tað mesta, og yvirskotshiti frá framleiðsluni verður brúktur til hita. Orkutørvurin er mettur at verða áleið 24 gigawatt-tímar (GWh)/ár. Tó verður ein oljudrivin ravmagnsgeri (neystreymsgeneratorur), sum verður nýttur, tá streymslit er, og sum hvørja viku verður royndarkoyrdur eitt stutt bil. Samlað fer hann bert at koyra fáar tímar um árið. Tí metir Umhvørvisstovan ikki, at roykur frá motorum fer at hava týðandi dálking við sær.

Treyt er um, at møguligir skorsteinar skulu leiðast upp um tekjuna.

## Spillvatn og útleiðing

Spillvatn skal leiðast út, har rákið er nóg gott til at tryggja, at evni og tilfar ikki hópast upp á botni, men verður ført burtur við rákinum. P/F Bakkafrost Freshwater hevur ikki gjørt streymkanningar á staðnum, har ætlanin er, at spillvatnsleiðingin skal renna út. Meting er tó gjørd av rákinum grundað á simulering av ráki á landgrunninum. Felagið metir, at rákið á miðal broddi er 40-60 cm um sekundið.

Umhvørvisstovan metir, at rákið á staðnum helst er sjóvarfalsrák, sum sveiggjar millum heilt spakt rák og harðari rák, kanska upp til 40-60 cm um sekundið á miðal broddi. Harafturat setir havalda millum landnyrðing og sunnan inn á økið. Sambært alduatlasi fyri Føroyar kann væntaða hægsta 50 ára alda á staðnum gerast upp til 8-10 metrar høg um veturin og einar 4 metrar um summarið.

Tá støðin byrjar virksemið, og áðrenn evnafrøðilig umgerð (denitrifikatión) av evnum, sum innihalda køvievni (N) í biofiltrunum, virkar til fulnar, er vatntørvurin hjá støðini við fullum rakstri sambært felagnum 1.370.000 $m^3$ um árið ella 3.753 $m^3$ hvørt samdøgur og 156 $m^3$ um tíman.

Vanliga ganga tað nakrar vikur, áðrenn biofiltur eru fingin at virka til fulnar, um ikki serlig fyrireikandi tiltøk verða gjørd fyri at fáa biofiltrini skjótari í gongd. Tá biofiltrini eru fingin at virka til fulnar, verður vatntørvurin sambært felagnum avmarkaður til 233.000 $m^3$ um árið ella um 638 $m^3$ hvørt samdøgur og 27 $m^3$ um tíman.

Ein partur av vatninum guvar burtur vegna hita, vatnreinsing og annað. Sambært felagnum verður nøgdin av spillvatni frá støðini um 139.000 $m^3$ um árið, sum svarar til um 381 $m^3$ um samdøgrið og um 16 $m^3$ um tíman.

Spillvatnið inniheldur m.a. skarn, evju frá biofiltrunum og fóðurleivdir.

Mett verður, at umleið 20 % av fóðrinum endar sum skarn og verður leitt út við spillvatninum. Við samlaðari fóðurnýtslu á 4.000 tonsum svarar hetta til um 800 tons um árið ella 2,2 tons um dagin og 91 kg um tíman. Umframt hetta má roknast við nakað av fóðurspilli og evju, eitt nú frá reingerð, reinsing av mekaniskum filtrum og annað.

Um fóðurleivdir, skarn o.a. hópast upp nærhendis útleiðingini, fer tað at føra til eina broyting av lívfrøðiliga margfeldinum á staðnum. Tí er krav sett um, at botn- og djóralívskanning skal gerast á staðnum, tá staðsetingin av útleiðingini er fastløgd, og áðrenn leiðingin verður tikin í nýtslu, umframt í minsta lagi eina kanning eftir at leiðingin er tikin í nýtslu, fyrstu ferð eftir trimum árum.

Endamálið við kanningini áðrenn leiðingin er løgd út er at staðfesta botnslag og hvørji djórasløg eru á staðnum. Kanningin svarar til eina undankanning fyri nýggj alibrúk sambært galdandi vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um umhvørviseftirlit við alivirksemi á sjónum. Kanningin eftir trimum árum skal staðfesta, um broytingar eru, og um neyðugt er við átøkum fyri at minka um árinið á umhvørvið.

Bitlar, sonevnd biolikam, vanliga úr plasti, sum verða nýtt í biofiltrunum, eru áður staðfest í náttúruni kring landið. Treyt er tí um, at P/F Bakkafrost Freshwater skal tryggja, at biolikam verða hildin aftur, og ikki fara út í spillvatnsleiðingina.

Henda umhvørvisgóðkenning er grundað á, at nýtslan av fóðri verður í mesta lagi 4.000 tons um árið. Um nøgdin av fóðri verður økt munandi, er ikki óhugsandi, at ávirkanin á umhvørvið økist, eitt nú at botnurin nærhendis spillvatnsútleiðingini verður ávirkað meiri, enn umhvørvið tolir.

Treyt verður tí sett um, at P/F Bakkafrost Freshwater í góðari tíð frammanundan skal boða Umhvørvisstovuni frá, um ætlanin er at økja um framleiðsluna, og hvørja ávirkan á umhvørvið ætlaða økingin væntast at hava. Umhvørvisstovan tekur so støðu til, um tørvur er á at dagføra umhvørvisgóðkenningina.

## Luktur

Framleiðsla av smolti kann hava lukt við sær frá eitt nú deyðum fiski og evju. Tí ætlar felagið at gera átøk í rakstrinum fyri at minka um luktin. Deyður fiskur verður súrgaður beinan vegin og goymdur í tanga, til hann verður avskipaður, og evja verður førd beinleiðis út á streymasjógv. Fóður verður goymt í lokaðari fóðurgoymslu innandura, og verður ført inn í skipanirnar í lokaðari rørskipan. Treytir eru settar til, at bøtandi tiltøk skulu setast í verk, um ampar eru av lukti.

## Goymslur

Sambært mannagongd hjá P/F Bakkafrost Freshwater um handfaring av vandamiklum evnum verða goymslur til kemisk evni gjørdar soleiðis, at eingin leki kann fara út í umhvørvið, og at bakki ella garður skal kunna rúma nøgdina í størsta ílatinum.

Sum nevnt í Lýsing av virkinum ætlar felagið at hava tveir niðurgrivnar oljutangar á 40.000 litrar, ið verða grivnir niður uttan fyri har, sum neyðstreymsgeneratorarnir eru. Sandur verður lagdur rundan um tangarnar og mold omaná aftur.

Neyðugt er at tryggja, at oljutangarnir eru í haldgóðum standi, og tí at fylgja við, at tangarnir eru heilir, at leiðingarnar frá oljutangum eru tættar og at felagið hevur skil á, nær góðkenda haldgóðskutíðin á oljutangunum ger, at teir skulu skiftast.

Treytir eru settar til goymslur av kemiskum evnum, eftirlit við niðurgrivnum oljutangunum og rørleiðingum og um, at spill av kemikalium, olju o.ø. skal kunna haldast aftur.

**Burturkast**

Kemikaliuleivdir og íløt nýtt í framleiðsluni, spillolja og annað serliga dálkandi burturkast verða latin til góðkendan móttakara.

Annað burturkast verður skilt í vanligt burturkast, jarn/metal, glas, elektronik, papp, pappír og vandamikið burturkast. Alt burturkast verður latið til hóskandi móttakara, eitt nú IRF.

Treytir eru settar um, at smoltstøðin hevur umstøður og væl skipaða burturkastskipan, sí nr. 6.6 í umhvørvisgóðkenningini.

**Innaneftirlit og umhvørvisstýring**

Sambært § 46 í umhvørvisverndarlógini kann Landsstýrismaðurin (Umhvørvisstovan) broyta treytirnar fyri einum virki ella loyvi fyri at bøta um eftirlit virkisins við egnari dálking (egið eftirlit) ella fyri at fáa til vega eitt betri hóskandi eftirlit.

Innaneftirlitsskipan verður sambært løggilding og umhvørviskrøvum. Í hesum skal felagið seta upp yvirskipað aðalmál og politikkir, sum eru grundarlag undir innaneftirlitinum, umframt at gera starvsskipanir/mannagondir og annað, sum kann viðvirka til, at settu málini verða rokkin.

Treyt er sett um, at P/F Bakkafrost Freshwater skal hava eina umhvørvisstýrisskipan, sum m.a. fevnir um mál og niðurskrivaðar mannagongdir fyri smoltstøðina, fyri at ávirkanin á umhvørvið verður minst møgulig.

**Óhapp**

Um rakstrartrupulleikar ella óhapp elva til týðandi dálking ella vanda fyri dálking, hevur tann, ið hevur ábyrgdina, sambært grein 41, 1. stk. í lógini, skyldu til at boða Umhvørvisstovuni frá hesum beinan vegin. Fráboðanin avmarkar, sambært stk. 2, tó ikki skylduna til at forða fyri og basa dálkingini á munagóðan hátt. Dømi um fyribyrging - heldur enn eftirsnari - kann t.d. vera at hava sjálvvirkandi stýring til at tilseta meyrusýru til súrløgu av deyðum fiski fyri alsamt at halda súrleikan (pH) á hóskandi støði, og við at hava sjálvvirkandi fráboðan, um pH-ið hóast sjálvvirkandi stýring fer upp um ráðilig mørk, ella um goymslan av meyrusýru minkar niður um trygg mørk.

Treytir eru settar um atgerðir í sambandi við óhapp.

**Skrásetingar og frágreiðingar**

Fyri at kunna meta um virksemið og møgulig árin ella dálking av tí, skal virkið skráseta viðkomandi rakstrarviðurskifti og møguliga gera kanningar, sum betri kunnu lýsa árinið. Sambært grein 40, 1. stk. skal felagið, eftir umbøn, lata Umhvørvisstovuni allar viðkomandi upplýsingar, ið hava týdning fyri at meta um dálkingina og fyri møguligar bøtandi atgerðir. Umhvørvisstovan kann eisini, sambært 2. stk. áleggja virkið at fremja kanningar ella at lata royndir av tilfari o.ø.

Treytir eru settar um at skráseta og at gera umhvørvisfrágreiðing sum part av eftirlitinum.